

## FAKTA

**Navn:** Ulrik Haagerup
**Føðingardagur:** 18. mars í 1963
**Aldur:** 47 ár
**Starv:** Tíðindaleiðari hjá DR
**Útbúgving:** Danmarks Journalisthøjskole (1986)
Starvaðist sum blaðmaður á Jyllands Posten frá 1986 til 1990
Var blaðstjóri á Jyllands Posten í árunum frá 1994 til 2001
Starvaðist sum blaðstjóri á Nordjyske Medier frá 2002 til 2007
Síðan 2007 hevur hann verið tíðindaleiðari hjá DR
Gav bókina 'En god idé – fik du den?' í 2004
Ulrik Haagerup er giftur og eigur trý børn

*Tað er eingin grundgeving, at samfelagið er lítið. Fjølmiðlar, politikkur og vinnulív skal ikki verða samantvunnið. At føroyska samfelagið er so lítið, er fremsta orsøkin til at vera serliga varin við, hvat tú sigur og ikki, sigur Ulrik Haagerup, tíðindaleiðari hjá Danmarks Radio*

keypa í ávísum sølumiðstøðum, sum hava gingið í ávísum skúlum, og sum hava ferðast til ávís lond í frítíðini. Men tað er øðrvísi, um tú arbeiðir á einum almennum miðli.

**Hvussu tá?**
Tú skal hugsa um, hvør rindar tína løn. Tað er einstaki borgarin. Hann krevur, at tú er objektivur og rættvísur afturfyri. DR hevur greiðar reglur um, at teirra sjónvarpsvertur skal ikki ganga við troyggju, har tað stendur "I love Jesus" á bringuni, ella hava ein kross í hálsketuni, meðan hann er til arbeiðis. Tú skal seta teg so lítið í fokus sum tilber, so hyggjarin hugsar um tíðindini, og ikki um títt trúvirði. Arbeiðir tú fyri public-service, so skalt tú ikki siga tína meining alment, tí so er títt trúvirði fokið.

**Um tú fyri fleiri árum síðan fekk keðiliga viðgerð á landssjúkrahúsinum – ert tú so egnaður at langa út eftir landssjúkrahúsinum fleiri ár aftaná?**
- Ja, so leingi, sum tú fylgir journalistisku meginreglunum, sum siga, at tú skal lýsa báðar síðurnar av málinum. Men tað ger ikki støðuna verri, um tú fært ein annan journalist í hópinum at viðgera málið.

**Men hvussu við journalistum, sum arbeiða fyri privatar miðlar?**
- Tá er støðan ein onnur. Tað eru fleiri tíðindabløð, sum eru heft at politiskum flokkum og øðrum. Samanborið við almennar miðlar, kunnu privatir miðlar framleiða júst tað, teir hava hug til. Tað kunnu bera vánaligan og litaðan journalistikk, so leingi tað loysir seg fíggjarliga. Privatir miðlar selja sítt tilfar, og um lesarin vil keypa tað, so rindar hann somuleiðis fyri tína løn. Um lesarin vil hoyra tína politisku meining, so keypir hann blaðið fyri at lesa hana. Tá er støðan ein onnur. Men almennu miðlarnir eru hinvegin tvungnir at lúka journalistisku uppgávurnar, og borgarin veit, hvat hann fær. Og tað er ikki litaður journalistikkur.

**Tað eru fleiri journalistar í Føroyum, sum áður hava verið valevni hjá politiskum flokkum, og sum hava verið virkin í ungdómspolitikki. Er tað nøktandi?**
- Ja, tað er tað. Øll hava eina fortíð. Tú hevur helst eisini sagt tína politisku meining, tá tú gekk á miðnámsskúla. Tað er krav hjá okkum, at tú er ikki heftur politiskt í dag. Um tú eitt nú er limur í Venstre, so fært tú ikki arbeiði hjá DR, áðrenn tú hevur sagt tín limaskap upp.

**Men skaðar tað ikki umdømið hjá journalistunum, at hann hevur stillað upp fyri nøkrum árum síðan?**
- Tað er upp til hin einstaka lesaran, hyggjaran ella lurtaran at gera av. Men so leingi, at vit hava lógir á økinum, sum borgarin er varðugir við, so er tað í lagi. At hann veit, at fjølmiðlamaðurin hevur havt ávísinar bindingar til vinnulig og politisk áhugamál. Fyrsta stigið er, at miðilin spælir við opnum kortum.

**Kann ein fjølmiðlamaður, sum áður hevur stillað upp, gera kritiskan og objektivan journalistik?**
- Ja, sjálvandi. Um hyggjarin veit, at hann áður hevur stillað upp, so ger hann skjótt vart við støðuna, um alt ikki fer rætt fram. Journalistar kenna eisini sína støðu. Hann veit, hvat er rætt og skeivt. Og hann verður revsaður, um tað ikki fer rætt fram. Um lesarin ikki dugir at skyna, um tað er óheftur journalistikkur ella heftur journalistikkur hjá almenna miðlinum, so er tað ein stórur trupulleiki. Privatu miðlarnir gera sjálvir av, hvat tilfarið í blaðnum er. Uppgávan hjá seriøsum fjølmiðlum, sum fylgja journalistisku idealunum, er altíð at vera í andstøðu við valdsharrarnar og sitandi stjórn.

**Fyri at taka samanum – hvør skal ein journalistur so vera?**
- Tað er ein, sum ikki er heftur at áhugabólkum. Tað er ein, sum ikki sigur sína meining alment, meðan hann er í starvi sum fjølmiðlamaður. Tað er ein, sum helst hevur sagt sína meining áður, men sum framvegis kann starvast um journalistur, um hann hevur reint mjøl í posanum í dag. Og so er tað ein, sum viðgerð øll mál frá báðum síðum, og tað er eingin umbering, um hann ikki ger tað.